LM-114/2020
FYLGISKJAL 1

Dátueftirlitið

Uttanríkis- og mentamálaráðið
Tinghúsvegur 7
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Tórshavn, tann 27. januar 2021
J.nr: 21/00067-2
Tykkara skriv:
Málsviðgeri: KTH

Um uppskot til løgtingslóg um KT-heildarætlan fyri undirvísingarverkið

Dátueftirlitið hevur fingið uppskotið til løgtingslóg um KT-heildarætlan fyri undirvísingarverkið til ummælis.

Í pkt. 1.1. í almennu viðmerkingunum til uppskotið er greitt frá, at verandi KT-skipanir í skúlaverkinum ikki lúka krøvini til verju av persónupplýsingum, og at hetta er ein av orsøkunum til, at uppskotið verður sett fram, og at nýggj skipan skal mennast.

Reglurnar um vernd av persónupplýsingum hava til endamáls at verja tann einstaka, tá persónupplýsingar um viðkomandi verða viðgjørdar. At verandi skipanir í skúlaverkinum, sum viðgera persónupplýsingar um flest allar føroyingar, undir hesum upplýsingar um børn, ikki lúka lógarásettu krøvini til verju av persónupplýsingum er álvarsamt og á ongan hátt nøktandi.

Dátueftirlitið tekur tí undir við, at nýggj skipan verður ment, sum lýkur lógarásett krøv til vernd av persónupplýsingum, samstundis sum skipanin økir um KT-trygd sum heild og hevur aðrar fyrimunir við sær. Dátueftirlitið heldur tað eisini vera sera skynsamt at gagnnýta ta undirstøðukervið og tær skipanir, sum longu eru mentar í sambandi við t.d. Talgildu Føroyar, og sum lúka krøv til TK-trygd og trygd í sambandi við verju av persónupplýsingum.

Dátueftirlitið skal í sambandi við heildarætlanina serliga gera vart við reglurnar §§ 38 og 49 í løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónupplýsingum (dátuverndarlógin).

Sambært § 38, stk. 1 um dátuvernd ígjøgnum sniðgeving skal dátuábyrgdarin seta hóskandi tøknilig og bygnaðarlig tiltøk í verk, tá tólini til viðgerð verða løgd føst, sum eru sniðgivin á ein slíkan hátt, at viðgerðin lýkur krøvini í løgtingslógini.

Í serligu viðmerkingunum til § 38, stk. 1 stendur m.a.:

> *"Ásetingin merkir, at dátuábyrgdarin í sambandi við at nýggj skipan verður umhugsað –t.e. tá tólini til viðgerð verða fastløgd – skal hugsa dátuvernd inn. [...]*
>
> *Dátuvernd ígjøgnum sniðgeving byggir á váðagrundaða tilgongd til dátuvernd. Dátuábyrgdarin skal tí í sniðgevingini hava fyrilit fyri verandi tøkniliga støði, íverksetingarkostnaði og slagi, vavi, samanhangi og endamáli við viðgerðini, umframt váðum av skiftandi sannlíkindum og álvaran fyri rættindum og frælsisrættindum hjá persónum, sum viðgerðin hevur við sær. Dátuábyrgdarin skal sostatt í hvørjum einstøkum føri meta um váðan við viðgerðini í mun til, hvørji tiltøk eru fyri neyðini, og hvussu hetta kann sniðgevast inn í skipanir."*

Dátueftirlitið

Í § 49, stk. 1 um avleiðingargreining er ásett, at um eitt slag av viðgerð, serliga tá ið nýggj tøkni verður nýtt, við atliti at slagi, vavi, samanhangi og endamáli, sannlíkt hevur við sær stóran váða fyri rættindi hjá einstaklingum, skal dátuábyrgdarin undan viðgerðini gera eina greining av, hvørjar avleiðingar ætlaða viðgerðin hevur fyri dátuverndina.

Dátueftirlitið skal at enda heita á Uttanríkis- og mentamálaráðið at tryggja, at viðgerð av persónupplýsingum, sum fer fram til nýggj skipan er ment, fer fram á ein hátt, sum lýkur krøvini í dátuverndarlógini. Hetta kann verða við bæði tøkniligum og bygnaðarligum tiltøkum.

Vegna Dátueftirlitið

Katrin Thorsvig Hansen